GJALDSTOVAN

**Frásøgn/niðurstøður frá fundinum mikudagin 20. februar 2013, um ymis viðurskifti millum land og kommunur.**

**Clearing av millumrokningum**

Súni Kristiansen tekur stig til at kommunur sjálvbodnar kunnu brúka Gjaldstovuna sum clearings-partnara, tá ið umræður ávísar millumrokningar millum kommunur.

**Góðska av bókingarskjølum**

Góðskan á øllum skjølum er ikki nóg góð t.d. skjøl viðvíkjandi Nainu. Gjaldstovan skal seta stovn-unum krøv til betur góðsku á skjølum, so týðiliga ber til at síggja hvat og hvønn rindað verður fyri.

**Búskettskipan í Leiðslukunning til kommunur**

Kommunurnar vóru sera áhugaðar í búskettskipanini. Gjaldstovan setur hetta í verk fyri kommunur-nar og heldur skeið.

**Gagnnýta fleiri av hentleikunum í Leiðslukunning**

Hvussu kunnu kommunur gagnnýta fleiri av teimum hentleikunum, ið eru mentar, ið kommunurnar hava atgongd til. Avtalað varð, at Gjaldstovan bjóðar fíggjarnevndunum saman við roknskaparfólk-unum á skeið.

**Avstemman av Ellisheimum**

Tórshavnar kommuna sigur, at tað eru trupulleikar av at stemma ellisheimini av, ið verða rikin av kommununi og endurfíggjað av landinum. Trupulleikin er orsakaður av, at ellisheimini skulu lata mánaðarroknskapin inn til Almannaverkið í seinasta lagi 6., tí seinasti dagur at bóka í landsrokn-skapinum er 8. Men mótvegis Tórshavnar kommunu er seinasti dagur ellisheimini lata mánaðar-roknskapin inn tann 15. Í hvørjum mánaða. Gjaldstovan tekur stig til fund um at finna eina loysn.

